Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Eirikur í Jákupsstovu, løgtingsmaður

Svarari: Margit Stórá, landsstýriskvinna í heilsumálum

Evni: Koppsetingar fyri skáldkoppar

Spurningar:

1. Hvørjar tankar ger landsstýriskvinnan sær um møguleikan at gera koppseting fyri skáldkoppar til part av koppsetingarætlanini fyri børn í Føroyum?

Viðmerkingar:
Í Danmark hava barnalæknar í rúma tíð víst á, at tað hevði verið ein fyrimunur fyri børnini, um tey sluppu undan at gerast sjúk av skáldkoppum.

Politikarar og onnur hava víst á, at hetta hevði verið ein fyrimunur fyri arbeiðsútboð, arbeiðsmarknað og annað, um børnini ikki gjørdust sjúk av skáldkoppum, og foreldur harvið ikki skuldu vera heima við børnunum hesar dagarnar.

Somuleiðis hevur verið víst á, at tað gevur ein sosialan ójavna, at summi sjálvi rinda fyri koppseting fyri skáldkoppar og tí ikki verða rakt av negativu avleiðingunum av skáldkoppum.

Á Løgtingi, 5. november 2024

Eirikur í Jákupsstovu